


*Tað var ein stór løta, tá supply-skipið Eldborg varð navngivið við Vestaru bryggju í Havn í juni mánað 2009 Mynd: Vilmund Jacobsen*

skipið verður gjørt liðugt. Sambært byggisáttmálunum verður annað skipið liðugt síðst í september í ár – og hitt næsta vár. Hesi skip eru størri enn fyrsta supply-skipið hjá okkum, Eldborg, sum kom á sumri í 2009.

Osmund, sum sjálvur er 69 ára gamalur og væl fyri, sigur, at tað eru tær yngru kreftirnar í felagnum, Tummas Justinussen, stjóri, saman við Jens Marnar Rasmussen, ið er skipsførari og løgfrøðingur, sum í fyrsta lagi taka sær av hesum.

Hann hevur stórt álit á hesum dugnaligu monnum, og hann heldur nógv av øllum teimum, sum starvast fyri felagið, bæði á landi og sjógvi.

Í føroyskum høpi eru sáttmálarnir, sum felagið í Leirvík hevur gjørt um hesi bæði supply-skipini, millum teir stóru í føroysku skipasøguni. Sáttmálin, sum kann samanberast við hesi bæði supply-skipini, er sáttmálin um nýggju Norrønu, sum eisini mundi liggja rundan um 700 miljónir krónur.

Osmund sigur, at tað hevur gingið væl við Eldborg, sum fyribils hevur sáttmálar fram til endan av 2012.

- Nú vóna vit, at tað eisini fer at gangast væl hjá nýggju skipunum. Tá ein verkætlanin er so stór, sum í hesum føri, antin gongur tað – ella gongur tað ikki. Her nyttar einki, at mín pensjón verður løgd í ætlanina fyri at dekka tað, ið kann koma at vanta í, um alt ikki gongur, sum tað skal, sigur hann brosandi.

Tað skilst tó honum, at vónirnar eru góðar – og vóru tær ikki tað, hevði felagið í Leirvík neyvan farið undir hesa verkætlan.

– Eingin eigur at halda, at vit hava lagt okkum at sova fyri tað, um ísfiskatrolararnir, Stjørnan og Polarhav, nú eru seldir. Ei heldur koyra vit krónurnar undir koddan, sum Osmund Justinussen skemtandi tekur til.

## Lítið á bók

Meðan vit práta, hugleiðir hann um ymiskt, sum hevur eyðkent nógv vinnulívsfólk.

– Nøkur menniskju hava fingið evnini at seta í verk, og tað er mín sannføring, at vit eiga at brúka okkara evni, har tey eru. Vanliga eru ígongdsetarar ikki pengasavnarar. Vóru teir tað, høvdu teir neyvan verið ígongdsetarar. Í vinnulívi gongur viðhvørt væl, og viðhvørt gongur minni væl. Nøkur ár kunnu góðar inntøkur spyrjast burtur úr, men hjá allar flestu vinnulívsfólkum liggur peningur stutt, men verður brúktur til nýggjar íløgur. Søgan sigur okkum, at nógv vinnulívsfólk høvdu lítið á bók, tá tey fóru undir grønutorvu, men kortini høvdu tey í fleiri førum skapt arbeiði til fleiri bygdaløg í síni virknu tíð, sigur hann og leggur aftrat, at sjálvandi eru undantøk.

Í november síðsta ár hevði Osmund Justinussen verið reiðari í samfull 40 ár.

Vit skulu ikki í hesi greinin nerta við alt tað virksemi, sum hann hevur havt við at gera, ei heldur nevna øll tey skip, hann hevur verið reiðari á.

Nú Stjørnan og Polarhav eru seld til Klaksvíkar, kunnu vit nevna, at hetta var triðja Stjørnan í røðini síðan 1973, tá Osmund saman við øðrum keypti fyrstu Stjørnuna. Polarhav, sum skipanavn, kom í flotan hjá honum seinast í sjeytiárunum.

– Øll hesi ár hava vit fingist við iðnaðarskip í Norðsjónum, og vit hava havt skip feskfiskaveiði á Føroyagrunninum, heilt síðan hesin fiskiskapur byrjaði her fyri sløkum 40 árum síðan, samstundis sum fiskavirkir byrjaðu at stinga seg upp kring landið.

Spurdur, hvussu nógvum skipum hann hevur verið reiðari á øll hesi mongu ár, sigur Osmund, at talan er um 35 skip tilsamans. Taka vit so teir bátar, sum fylgdu við keypinum av ognunum hjá Kjartani Joensen og tey nýggju supply-skipini, sum nú eru í gerð, er talan um 40 skip tilsamans, sum hann hevur havt við at gera.

Sosialurin kann leggja aftrat, at taka vit øll hesi skip og samanbera tey við skipatalið, sum gamli Kjølbro í Klaksvík umsat gjøgnum mong ár, táttar virksemið í Leirvík samanlagt í virksemið, sum Kjølbro hevði í Klaksvík í fimmti-og sekstiárunum.

– Nú fer mín leiklutur sum reiðari at minka. Men eg kenni meg væl, og mær dámar ómetaliga væl um sumrarnar at gera onkran túr við kalvalínu við 20-tonsaranum, Heiðrikki, sum vit eiga, sigur Osmund.

## Góður stuðul

Vit spurdu eisini Osmund Justinussen, hvar kona hansara, Jórun, hevur verið í øllum hesum virkseminum gjøgnum so mong ár.

- Eg og synir mínir hava havt ein góðan stuðul í konuni og mammuni. Tað hevur jú ikki bara gingið væl, men ongantíð er hon komin aftaná og hevur sagt, at hetta ella hatta skuldi eg ongantíð havt gjørt – heldur ikki, tá avgerðin var skeiv. Jórun hevur borið við øll hesi 40 árini, bæði tá tað gekk við – og tá tað gekk ímóti. Tað eigur hon stóra tøkk fyri, sigur Osmund Justinussen.

vilmund@sosialurin.fo